# Føroyakvøld í Mentanarhúsinum í Fuglafirði

**Í kvøld verður skipað fyri Føroyakvøldið í Mentanarhúsinum í Fuglafirði**

FØROYAKVØLD
*Tíðindaskriv*

Í summar hevur verið skipað fyri føroyakvøldum ymsastaðni í Eysturoynni. Tey kvøldini, sum higartil hava verið, hava verið væl eydnað, og gestirnir hava verið væl nøgdir. Kvøldini eru bæði ætlað útlendingum og føroyingum.

Nú er so tíðin komin til at tiltakið skal verða í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Hetta kvøldið verður komandi fríggjakvøld 6. september. Á skránni verður eitt breitt úrval av føroyskum mati, so gestirnir fáa etið seg mettar og roynt ymiskan siðbundnan føroyskan mat. Ymiskt undirhald verður á skránni sum t.d. upplesnaður um føroyska samfelagið, søgu og mentan, felagssangur og filmur um Føroyar. Kvøldið endar við eini dansiframførslu har gestirnir eisini sleppa at royna stev. Eisini verður framsýning av føroyskt tilvirkaðum vørum.

Kvøldið byrjar klokkan 19.30. Atgongumerkini kosta 250 kr. og kunnu keypast á Kunningarstovunum í í Fuglafirði og Saltangará.


## Tøkk

Hjartaliga takk fyri hjálpsemi og sýnda samkenslu, tá okkara elskaða kona, mamma, vermamma og omma

**Ása Sólbrún Høj**
Strendur

fór heim til Harran.

Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur til nýbyggingina í Kelduni.

Ein serstøk tøkk til starvsfólkið á B6, og samkomuna í Kelduni.

*Fyri tey avvarðandi*

**Jógvan Martin, Tummas Jákup, Lisa, Pauli og Leif**

## *Móttøka*

Leygardagin 7. september 2002 verða tað 40 ár síðani ***Finnbjørn og Eyðun Mouritsen*** byrjaðu at selja máling í 23 $m^2$ stórum kjallara í J. C. Svabosgøtu. Í hesum sambandi verður móttøka

**fríggjadagin 6. september 2002**
**kl. 15.00 til 17.00 í HB húsinum í Gundadali**

*Vinarligast*

***P/F Litaval***
***Málingahandilin***
***Vøruhúsið á hjalla***


# Jens Marni gjørdi vart við seg



**Jens Marni Hansen var ein av høvuðspersónunum í fyrsta partinum av Popstars, sum danska TV2 sendi týskvøldið. Dómararnir vóru als ikki í iva um at senda Jens Marna víðari í kappingini**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Týskvøldið setti danska sjónvarpsrásin TV2 hol á sendirøðina Popstars, har málið er at finna eina poppstjørnu millum fleiri enn 2000 luttakarar. Fyrsti parturin snúði seg um fyrstu upptøkuroyndina, har 92 sangarar skuldu veljast burturúr teimum mongu, sum bjóðaðu seg fram.

Ein av høvuðspersónunum í hesum parti var kollfirðingurin Jens Marni Hansen. TV2 tók ímóti honum á flogvøllinum í Kastrup, og síðani fylgdu teir luttøkuni hjá honum í kappingini.

– Eg havi dreymin um at náa langt sum stjørna innan tónleikin, segði Jens Marni við einum speiskum smíli í hýruvogninum á veg til upptøkuroyndina.

### Sang sera væl

Jens Marni valdi millum nakrar fáar sangir at syngja Angels hjá Robbie Williams, og hann gjørdi rættiliga vart við seg, tá hann stóð frammanfyri dómarunum.

Hann sang sangin væl og nógv betur enn flestu av hinum, sum royndu seg, og tí vóru dómararnir als ikki í iva um, at Jens Marni skuldi víðari í kappingini.

Jens Marni var skjótur í fartelefonina at ringja heim til damuna at siga, at hann hevði klára fyrstu royndina. Hann var millum tey 92 útvaldu, og í næsta partinum av Popstars skal Jens Marni til næstu royndina, har talið á luttakarunum aftur verður skorið nógv niður.

# Dansiskeið í Rock´n Roll

DANSUR
*Tíðindaskriv*

Týskvøldið 10. september skipar dansifelagið Kom og Dansa fyri einum grundskeiði í rock´n roll dansi.

Hetta slagið av dansi hevur norðmaðurin, Johan Fasting, ment í skjótt 40 ár. Í Føroyum var hesin dansurin fyrstu verð at síggja í 1989, tá einir 100 norðmenn vóru her og vístu fram og eisini lærdu fólk her upp til at kunna undirvísa í hesum dansinum.

Og sigast má, at nógv fólk hava nýtt møguleikan at læra hendan dansin, eini 1000 fólk hava verið á skeið síðani byrjað varð.

Og tað verða instruktørar frá systirfelagnum hjá Kom og dansa, íslenska Komið og dansið, sum fara at undirvísa hetta kvøldið.

Tað er soleiðis, at Samstarvsgrunnurin Nuuk - Tórshavn - Reykjavík, hevur stuðlað Komið og dansið at hava eina røð av skeiðum, bæði á skúlum og alment, og er skeiðið tí ókeypis.

Tað er bara at tekna seg á kunningarstovuni og møta í fimleikarhøllini á læraraskúlanum týskvøldið kl 20, skeiðið varir til kl 23.

Kom og dansa sigur at, dentur verður lagdur at hetta er eitt grundskeið, har øll kunna verða við.

# Føroyskt mix av Boney M sangum

**DJ Eddy hevur gjørt eitt bland av kendum sangum hjá Boney M. Hetta bland skal nú royna seg á 15 teimum bestu**

Um slakar tvær vikur fer disco-bólkurin Boney M at spæla á konsert í Fuglafirði. Bólkurin er eisini aktuellur á annan hátt, tí leygardagin var eitt føroyskt mix av sangum hjá Boney M eykalag á 15 teimum bestu.

Tað er føroyski DJ Eddy, sum hevur sett nøkur av kendu sangunum hjá Boney saman. Hann kallar tað Boney M Retro Megamix. Næsta leygarkvøld fæst at síggja, um føroyski ungdómurin er fallin fyri blandinum hjá DJ Eddy.

Forsølan av atgongumerkjum til konsertina við Boney M er nú byrjað.



# Eru eftir havhesti

HAVHESTAUNGAR
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

So lítið av havhesti hevur verið til fleiri dagar, at tað ber til at brúka eintalsvendingina, at fara eftir havhesti og ikki havhestum. Men meldingarnar eru ymiskað, tí kring Lítlu Dímum var sjógvurin hvítur av hesum feitu leskibitum, sum flutu dovnir og tungir í sjónum.

Men í Skopunnarfirði hevur verið lítið at fingið, nógv minni enn undanfarin ár. Mikudagin seinnapartin stóð Jaspur Hansen úr Skopun og seldi havhestaungar í Vágsbotni, Hann hevði ein kagga við saltaðum havhestaungum, sum hann hevði fingið í Skopunnarfirði dagin fyri. Teir lógu reinir og nossligir og sugaðu salt niðri í blóðlitaða lakanum. Omaná lógu tveir spillfeskir, klárir at koyra í ovnin.

- Vit hava havt langar dagar, átta tímar í gjár og tað er bert hendinga bátur sum er komin yvir 100 havhestar. Tað er nógv minni til í ár enn í fjør, sigur Jaspur, meðan hann potar ein havhestaunga niður í ein hvítan posa og handar einum havnafólki hann.

Onkur hevur hug at tingast um prís, hesi gírigu havnafólkini við stórari fastari løn og væl á bók. Men tað ræðir ikki útróðrarmannin, sum leggur nógv fyri at fáa sær úrtøkuna, tað verið seg við snellu, línu ella á havhestaveiðu. Jaspur er fastur sum bergið og vikast ikki tá fólk royna at spara sær nakrar krónur. Eygnabráið í andlitinum, íð er reyðdæmt av sól og salti, letir seg ikki taka av fótum, at snildum fólki, ið vilja gera forrætning. Ein havhestaungi er ein havhestaungi og tað liggur eins nógv stríð í hvørjum einstøkum unga, fyrst at taka hann, síðan at kippa, síðan at skolda og reinsa og so í salt. Ein havhestaungi er ein havhestaungi og prísurin er tann sami, um tú so keypir allan kaggan. Og tað stendur ikki á at selja, nógv fólk eru kring kaggan og har minkar í hvørjum.

Longur inni í krókinum stendur ein og selir grind. Tað má vera finnigarfiskurin í havnagrindini, tí so smábýtt var, at ongin kundi fáa nakað at selja av vanligum parti. Tað stóð ikki á hjá manninum at sleppa av við fesku grindina.



*Jaspur prátar og selir havhestaungar til havnafólk*
*Mynd Jens Kr. Vang*


**Heilsøla við kortum**

Innbjóðing
Gávukort
Borðkort
Brúdleypskort
Gull- og silvurbrúdleypskort
Føðingardags- og barnakort
Dóps- og konfirmatiónskort
Jólakort
Pappírstaskur *til jóla o.a.*
Skemtikort *nú á føroyskum*



**Vit eru við á vørumessuni á bási 28**

**EB-Heilsølan**
Heinagøta 14 • 100 Tórshavn • Tel./Fax 315090

Sosialurin - 311820

VÆLKOMIN TIL MÓTTØKU Á DEILDINI



Á TVØROYRI

SANSIR TEL 355355

Nú Tryggingarfelagið Føroyar er flutt í nýggj høli á Tvøroyri, bjóða vit til móttøku

**6. september kl. 14.30 til 17.00**

Vit vóna at gestir okkara taka konu/mann og børn við, so vit øll kunnu hugna okkum saman.

Nógv forvitnisligt verður á skránni henda dagin.

**Kl. 14.30** fara Angela, Hannibal og Gandakallurin at skemta við børnunum, har gandakynstur og framleiðsla av tryggingarbommum verður á skránni.

**Kl. 16.00** verða røður og Guðrun Jacobsen og Pætur Larsen syngja og spæla.



Annað verður eisini á skránni, td. ein spurnarkapping við vinningum, sum verða trektir á staðnum, og eitthvørt, sum vit ikki vilja avdúka her.

Hjartaliga vælkomin
*Anna, Signar, Kevin og Guðrið*



**ANNA LARSEN**
DAGLIGUR LEIÐARI



**SIGNAR OLSEN**
SÝNSMAÐUR



**KEVIN JOENSEN**
KUNDARÁÐGEVI



**GUÐRIÐ STRØM**
TRYGGINGARNÆMINGUR

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
FO-800 Tvøroyri, Tel 345600, fax 371290